


# Ternet Ninja

Tannáringurin Aske fær eina ninjadukku, sum er bæði puntut og livandi. Dukkan hevur tørv á, at Aske hjálpir henni við einari morðgátu, og Aske hevur tørv á, at dukkan hjálpir honum við at megna lívið sum tannáringur – hetta hevur sínar avbjóðingar við sær!

/ Málbólkur: 5. til 8. flokkur
/ Spælifilmur, Danmark 2018

Copydan/ AVU-medier
cfu centre for undervisningsmidler
NÁM

# Námsfrøðilig viðmerking

“Ternet Ninja” er bæði ein sera stuttligur filmur og ein álvarsom frásøgn um Aske, sum fer ígjøgnum eina menning, sum ger, at hann at enda lærir at seta onnur áðrenn seg sjálvan. Børn og ung dragast at unga høvuðspersóninum í hesum filminum, sum tosar teirra mál, og sum samstundis hevur ein uppbyggjandi boðskap um vinalag, hevnd, happing og barnaarbeiði. Filmurin er viðkomandi og veruleikakendur gjøgnum lýsingina av gerandisdegnum og familjuni hjá Aske, samstundis sum hann eisini hevur ein farra av fantasi við tosandi dukkuni, sum altíð er til reiðar at stríðast.

Umframt vegleiðingina til filmin frá Filmcentralen (sí niðanfyri), so hevur Alinea Gorilla eina undirvísingargongd til miðdeildina til “Anders Matthesen på lyd, skrift og film”, sum leggur dent á filmisk virkisamboð, stereotypiskar persónslýsingar, bygging/kompositión, boðskap og temu.

Kapitlasett við spurningum til filmin er til taks. Næmingarnir kunnu arbeiða við hesum spurningum sjálvir. Íblásturin til spurningarnar kemur úr vegleiðingini hjá Filmcentralen, og legga teir dent á, hvønn hugburð filmurin vísir um barnaarbeiði, menningina hjá Aske gjøgnum filmin, nýtsluna av skemti og álvarsemi hjá Anders Matthesen og boðskapin í filminum. Næmingarnir skulu lesa spurningarnar, áðrenn teir fara at hyggja eftir filminum, sum skal síggjast uttan steðg. Síðani kunnu teir hyggja eftir ávísum brotum aftur og arbeiða við spurningunum úr kapitlasettinum til brotið. Tosið saman í flokkinum um svarini. Á gjaldsíðuni hjá Alinea, sum eitur Gorilla, er ein undirvísingargongd til miðdeild, og á ‘danskportal’ á Gyldendal er ein undirvísingargongd til hádeild.

Í lærubókini “Anders Matthesen – Kongen af comedy” hjá Trine May eru uppgávur til filmin. Um tykkara CFU hevur keypt flokssettið ber til at læna hana til næmingarnar á mitcfu.dk (sí leinkið undir “Sammenhæng”.)







# Yvirlit yvir kapitlarnar og innihald

Kapitlasett

## Spurningar til næmingar til sjálvstøðugt arbeiði

Næmingurin kann arbeiða sjálvstøðugt við spurningunum í kapitlasettinum, sum snúgva seg um barnaarbeiði, menningina hjá Aske, skemt, álvarsemi og boðskapin í filminum.

**01: Barnaarbeiði** / 00:00:02
(Hygg fram til 00:04:38) Hvussu er umhvørvið, sum vit síggja í byrjanini? Hvønn leiklut ella ábyrgd hava vit í hesum viðurskiftum, sum børnini arbeiða undir? Hvussu kunnu vit broyta hesi viðurskifti?

**02: Menningin hjá Aske** / 00:07:03
(Hygg fram til 00:12:58) Hvussu er lívið hjá Aske, áðrenn hann fær puntutu ninjadukkuna? Hvørjum avbjóðingum stríðist hann við? Hvat í atburðinum hjá Aske fortelur okkum eitt sindur um, hvønn hugburð hann hevur til heimin kring seg? Hvønn leiklut hevur Aske í skúlanum og heima? Hví er tað so trupult hjá Aske at gera vart við seg, tá hann upplivir okkurt órættvíst? Hvat lærir Aske av vinalagnum við ninjadukkuna? Nevn dømi úr filminum, sum vísa, at Aske er djarvari aftaná at hann hevur hitt ninjadukkuna.

**03: Skemt og álvarsemi** / 00:55:14
(Hygg fram til 01:00:00) Kanna, hvussu Anders Matthesen nýtir skemt og álvarsemi til at leggja dent á okkurt ávíst og geva okkum okkurt at gruna um. Finn dømi um skemt í brotinum frá sálarsjúkrahúsinum. Finn síðani dømi úr filminum, har álvarsom evni verða tikin upp. Hvussu heldur tú tað riggar at blanda skemt og álvarsemi saman, og hvønn týdning hevur hetta fyri tína uppliving av filminum?

**04: Boðskapur** / 01:10:56
Hvussu lærir filmurin okkum at gerast betri menniskju? Hvat er boðskapurin í filminum í stuttum?